LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

13. desember 2017
Mál: 1025-021/17-2
Viðgjørt: GMN

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 28/2017 eftir tingskipanini § 52 til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Kristionnu Winther Poulsen, løgtingsmanni, viðvíkjandi kriminalisering av sálarligum harðskapi og um Istanbul-sáttmálan**

**Fyrispurningurin er soljóðandi:**

1. Er sálarligur harðskapur kriminaliseraður sambært galdandi rættarpraksis í Føroyum?
2. Um nei, hvørja áskoðan hevur løgmaður á at kriminalisera sálarligan harðskap?
3. Hvørjar serligar avbjóðingar metir løgmaður eru í sambandi við at kriminalisera sálarligan harðskap?
4. Heldur løgmaður, at Føroyar eiga at seta í gildi Istanbul-sáttmálan?
5. Metir løgmaður, at ásetingarnar í Istanbul-sáttmálanum verða fylgdar í Føroyum?
6. Finnast tøl fyri sálarligan harðskap í nærsambondum í Føroyum?

**Svar**

**Til spurning 1 og 2**
Grein 33 í Istanbul-sáttmálanum ger tað revsivert tilætlað at fremja álvarsligan skaða á sálarliga frælsi hjá einum persóni við at nýta tvingsil ella hóttanir.

Sambært § 245, stk. 2 í revsilógini kann tann, sum ger skaða á annans likam ella heilsu, verða revsaður við fongsli í upp til 6 ár. Skaði á heilsu fevnir eisini um sálarligar løstir.

§ 266 í revsilógini fevnir um tann, sum hóttir onkran við at fremja revsiverda gerð, og hóttanarmátin er egnaður til at kunna skapa stóran ótta fyri lívi, heilsu ella vælferð hjá tí hótta ella øðrum. Revsiramman er sekt ella fongsul í upp til 2 ár.

Sálarligur harðskapur er sostatt revsiverdur í Føroyum í sambandi við annan harðskap, tvingsil og hóttanir, men er ikki kriminaliserður sjálvstøðugt.

Tá løgregla og dómstólar eru ríkismyndugleikar, hevur Løgmansskrivstovan ongar upplýsingar um málsgongd ella rættarsið í tílíkum máli.

**Til spurning 3**
Eingin ivi er um, at sálarligur harðskapur hevur stórar og álvarsligar avleiðingar við sær fyri tann, sum er fyri hesum. Sum tað sæst í svarinum til spurning 1 og 2, er sálarligur harðskapur

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

revsiverdur í Føroyum í sambandi við annan harðskap, tvingsil og hóttanir, men er ikki kriminaliserður sjálvstøðugt.

Tað er sera trupult at kriminalisera sálarligan harðskap. Orsøkin til hetta er, at tað eru sera strong próvkrøv fyri at døma í revsimálum. Prógvast skal, at tann ákærdi uttan rímiligan iva er sekur. Fyri at kunna prógva hetta, má tað prógvast, at sálarligi harðskapurin er tilætlaður, og at tann sálarligi løsturin er ein beinleiðis avleiðing av tí sálarliga harðskapinum.

Revsiásetingar skulu í størst møguligan mun hava eitt ítøkiligt og objektivt avmarkað innihald. Hetta hevur týdning fyri rættartrygdina, har tað er eitt grundleggjandi krav, at tann, sum skal revsast, skal hava møguleika at skilja, at talan er um revsiverd viðurskifti. Tað er sostatt ikki avgerandi, um ein persónur kennir seg at hava verið fyri einum broti.

Ein áseting, sum lýsir ein óítøkiligan atburð, sum t.d. ræðandi, hóttandi, darvandi, ger tað torført framanundan at avmarka virkisøkið, og ger tað samstundis torført at lyfta próvbyrðuna. Tískil fer ein sjálvstøðug kriminalisering av sálarligum harðskapi neyvan at bera í sær fleiri dómar fyri sálarligan harðskap.

Hinvegin kann umhugsast at nýta ikki revsirættarlig tiltøk, sum Istanbul-sáttmálin nevnir sum val møguleika. Tilhaldslógin er eitt dømi um eitt ikki revsirættarligt tiltak.

**Til spurning 4 og 5**
Ásetingarnar í Istanbul-sáttmálanum fevna sera vítt. Áðrenn støða kann takast til, um hesin sáttmálin eigur at verða settur í gildi fyri Føroyar, er tað neyðugt saman við teimum stjórnarráðum, hvørs málsøki eru fevnd av sáttmálanum, at kanna, hvørjar avleiðingar hetta hevur fyri Føroyar, t.d. hvørjar skyldur vit átaka okkum, og í hvønn mun lóggáva skal gerast ella broytast.

Á revsirættarliga økinum samsvarar føroysk lóggáva stórt sæð við Istanbul-sáttmálan. Tað eru tó øki, har tað er meira ivasamt, um Føroyar lúka treytirnar í sáttmálanum, t.d. hava vit onga akutmóttøku fyri persónar, sum eru neyðtiknir, soleiðis sum tað stendur í grein 25.

**Til spurning 6**
Løgmansskrivstovan hevur ikki kunnleika um onnur tøl fyri sálarligan harðskap enn tey, sum Kvinnuhúsið í Havn hevur gjørt.

Í Tinganesi, 13. desember 2017

Aksel V. Johannesen
løgmaður